Marita Petersen, rættarnevndarlimur:

Ikki eitt uppskot um loysing

- Løgmaður sigur sunnumorgunin, at Javnaðarflokkurin er samdur við Tjóðveldisflokkinum um loysing. Tað er ikki rætt, sigur Marita Petersen

DAGNY JOENSEN

Tað loypti hvøkk á nógvar lurtarar sunnumorgunin,tá Edmund Joensen, løgmaður, í útvarpinum boðaði frá, at hann fór at útskriva val dagin eftir.

Í viðmerkig til hetta sigur Marita Petersen, at taðvæl altið kann henda, at partarnir ikki koma til semju, men at tað sum gjørdi hana kløkka var, at Edmund Joensen í samrøðuni sunnumorgunin fleiri ferðir dróg Javnaðarflokkin inn í nýggju samgongusamráðingarnar..

Gav Javnaðarflokkinum skyldina

- Eitt nú segði løgmaður, at ein høvuðsorsøkin til samgongukreppa spurdist burturúr var málið um ríkisrættarligu viðurskiftini, har Javnaðarflokkurin í ting-inum var samdur við Tjóðveldisflokkinum í málinum um Framtíðarstøðu Føroya

- Her eru nakrar misskiljingar, sum eg fegin vil rætta, sigur Marita Petersen.



Marita Petersen er limur í rættarnevndini. Undir fyrstu viðgerð av málinum greiddi hon frá, at Javnaðarflokkurin ikki kundi taka undir við uppskotinum hjá Tjóðveldisflokkinum.

Ov álvarsligt mál

- Viðvíkjandi uppskotinum hjá Tjóðveldinum um Framtíðarstøðu Føroya, so er tað sum heild eitt uppskot um loysing, og tað gongur Javnaðarflokkurin ikki inn fyri. Javnaðarflokkurin er ikki loysingarflokkur, sigur Marita Petersen..

- Harnæst haldi eg, at uppskotið hjá Tjóðveldisflokkiunum ber brá av at vera propagandauppskot, og tað er málið alt ov álvarsligt til at vit góðtaka slíkt.

- Hinvegin, so er tað umráðandi at føroyskir politikarar viðgera stýrisskipanarligu viðurskiftini í Føroyum, og eisini støðuna hjá Føroyum í ríkinum.

Bert uppskot um kanning og viðgerð

-Tí setti eg broytingaruppskot fram um at tingið skuldi gera fyrireikingar til arbeiðið. Talan er í fyrsta umfari ikki um broytingar, men kanning og viðgerð av málinum, sigur Marita Petersen.

- Tí legði eg serliga til merkis sunnumorgunin, at løgmaður segði Javnarðarflokkin vera samdan við Tjóðveldisflokkinum um loysing.

- Tað er Javnaðarflokkurin als ikki, g tað veit løgmaður væl. Vit halda bert, at føroyskir politikarar hava skyldu at viðgera og taka støðu til til stýrisskipanarligu viðurskiftini, og hetta eigur at verða viðgjørd av øllum flokkum - eisini Sambandsflokkinum, og tí setti eg uppskotið fram.

Løgmaður komin til vit og skil

- Nú sær út til at vit fáa eina samgongu, og tað frættist at í samgonguskjalinum er avtalað, at hesi við-urskifti skulu viðgerast, utt-an tó at løgmaður hóttir við nývali.

- Tað er at fegnast um, at at sjálvt Edmund Joensen er komin til vit og skil, sigur Marita Petersen.

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/f 403,
P/f Hjá Karl Jespersen, 800 Tvøroyri.

Viðtøkur broyttar:
18.12.1995

Nýtt navn: Sp/f Hjá Karl Jespersen

Kapitalur: Hækking við kr. 60.000,00 til kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 60.000,00 við grunshækking

Nevnd: Farin frá sum formaður: Ole Georg Jonhard Jensen, 800 Tvøroyri.
Innkomin sum formaður: Majvør Hovgaard, 800 Tvøroyri.

Stjórn: Innkomin sum stjóri: Ole Georg Jonhard Jensen, 800 Tvøroyri.

Tekningarreglur:
Felagið verður bundið av stjóranum ella av tveimum nevndarlimum.

Skráseting Føroya
tann 5. juni 1996

Kristin Balle



Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum:

Høgrasnaringin er nú veruleiki

- Sambandsflokkurin hevur gjørt ein taktiskan brølara við at halda fast um at hava tríggjar mans í Tinganesi. Afturfyri seldu teir Fólkaflokkinum fíggjarmál og fiskivinnumál. Nú kann hann eftir ólavsøku ótarnaður fáa slangguna í landskassan aftur, sigur formaður í Javnaðarflokkinum

DAGNY JOENSEN

- Tað var sjálvandi at væntа, at um Fólkaflokkurin fór í samgonguna fyri Javnaðarflokkin, so fór høgrasnaringin at siggja dagsins ljós. Javnaðarflokkurin var júst trygd fyri, at høgrasnaringin ikki slap framat, sigur Jóannes Eidesgaard í viðmerking til nýggju samgonguna.

Fyrrveradi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ivast ikki í, at Edmund Joensen, løgmaður, hevur ynskt sær borgarliga samgongu, serliga tá hugt verður aftur um bak, hvussu løgmaður hevur hóvreiggjða sær móti Javnaðarflokkinum.

- Nú hevur løgmaður fingið tað,sum hann vildi.

Verkamannafylkingin selt sína sál

- Tað eru helst eisini nógv, sum spyrja seg sjálvan, hvar bleiv av Verkamannafylkingini. Hon hevur nú fullkomiliga mist sín samleika. Serliga mótsigadi er tað, tá Kristian Magnussen herfyri segði, at teir ætlaðu at stovna ein vinstravendan flokk. Nú eru Óli Jacobsen, Kristian Magnussen og Axel Nolsøe farnir so langt av vinstraleið, at teir koma undan aftur høgrumegin í føroyskum politikki, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at Verkamannafylkingin hevur selt sína sál. Teir fóru upp í politikk fyri at útvega fólki nýggj arbeiðspláss. Teir sótu á vinnumálum, uttan tó at nakað stórvegis spurdist burturúr, men nú hava teir latið tað frá sær. Ístaðin hava teir fingið almanna- og heilsumál, og eftir samgonguskjalinum at skilja, so verða neyvan nøkur arbeiðspláss stovnað har - heldur hinvegin.

- Tað vísir bert, at tað einki mark er fyri, hvat politikarar kunnu góðtaka, bert fyri at varðveita sín sess, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann skilir ikki rættiliga, hví tað er so umráðandi hjá Sambandsflokkinum at fáa tríggjar mans í Tinganes, tí Sjálvstýrisflokkurin hevur virkað sum sambandslimur í samgonguni.

Taktiski brølarin hjá Sambandsflokkinum

Jóannes Eiedesgaard er avgjørdur, tá hann sigur, at stóri sigursharrin er Fólkaflokkurin, sum hevur fingið fíggjarmál og fiskivinnumál at umsita.

Tá ráðharraskipanin eftir ólavsøku verður sett í gildi, kann Fólkaflokkurin aftur fáa slanguna í landskassan.

- Sambandsflokkurin hevur hervið gjørt ein taktiskan brølara,við at halda fast um at fáa tríggar mans í Tinganes. Afturfyri seldu teir fiskivinnumál.

Annar sigursharri í hesum leiki er Føroya Banki, sum nú kann seta seg upp afturá, og bert bíða eftir, at landskassin ger sítt til at fáa vinnulívið á føtur aftur.

- Tað kann sigast, at tríggir sambandsmenn í Tinganesi rigga væl á einari mynd, men ein mynd hevur einki at týða í dagsins politikki.

Løgmaður prógvað at hann ikki er álitandi

- *Angrar tú at tit søgdu samgonguna upp?*

- Nei, als ikki, tí vit høvdu góðar grundir at fara. Løgmaður hevur víst, at hann ikki er álítandi. Bert tað, at hann útskrivar val ein fyrrapart, og angrar aftaná, prógvar, at okkara avgerð var røtt, men tað harmar okkum, at vit ikki kundu forða fyri tí, sum nú hendir.

- Tað er prísurin tú noyðist at gjalda, um tú sum flokkur vil varðveita trúvirði, og ikki lata sær alt lynda, sigur Jóannes Eidesgaard, og vónar, at Javnaðarflokkurin vendir styrktur aftur.

- Tá eg var greiður yvir, at tað konstruktiva í samgonguskjalinum var uppbrúkt, og bert tann oyðileggjandi parturin var eftir, eitt nú hunddálkingin av Javnaðarflokkinum,sum ikki skundaði undir samstarv og virðing millum partarnar, valdu vit at fara.

- Vit skulu eisini út aftur til veljaran, og tí kundu vit ikki verða sitandi og einki fáa á skaftið, sigur Jóannes Eiedesgaard, sum kortini heldur, at tað er ein uggi í hesum. Samgongan fer ikki at yvirliva í tvey ár.

- So skal løgmaður taka annað skinn um bak, men tað ger hann neyvan, sigur Jóannes Eidesgaard.